VIÐMERKINGAR

# Fundamentalisma ella hunda-mentalisma

**Dánial á Dul Jacobsen**

Nú fosturtøkumálið enn einaferð er frammi, leggur tú merki til, at sjónarmiðini fyri ella ímóti fosturtøku standa eins langt frá hvørjum øðrum, sum eystur er frá vestur. Hetta undrar mangan, tí tað skilst, at her finst eingin millumvegur. Sjáldsamt sum báðir partar halda upp á sítt, og hjá báðum pørtum er antin svart ella hvítt. Hví er hetta so? Finst nøkur frágreiðing? Og er tað veruliga so, at partarnir ikki kunnu møtast?

Fyri at kunna svara hesum spurningum, mugu vit hyggja eftir grundarlagnum hjá báðum pørtum. Eitt orð, sum ofta hevur verið nevnt í hesum kjakinum er orðið fundamentalistur ella fundamentalisma. Fleiri av teimum, sum er fyri fríari fosturtøku, nevna hin partin fundamentalistar, sagt í tónum, so tú skalt ikki vera í iva um, at hetta er = muslimska fundamentalismu/terrorismu.

Orðið fundamentalistur kemur av orðinum fundament. Í Ludvig Meyer's fremmedordbog verður millum annað sagt um merkingina: *Grund, grundvold, begyndelsesgrunde, grundbegreber, grundregler, forkundskaber.* Við hesum í huga spyrt tú: Ber tað til at vera fundamentleysur? Í so fall: Eru so fundamentloysingar hundamentalistar? Nei, hundamentalistar eru ikki til. Vit eru øll fundamentalistar og eftir stendur so bert tann eini spurningurin: Hvat er fundamentið hjá hvørjum einstøkum av okkum?

Jesus talar um "grundbegreber". Um hetta at byggja á orð. Í hansara talu er heldur ikki spurningurin um fundament ella ikki fundament. Spurningurin er bert, hvat slag av fundamenti byggja vit á. Jesus sigur, at tann, sum byggir á orð hansara er líkur vitigum manni, ið byggir hús sítt á hellu, meðan øll onnur eru dárar og byggja á sandi.

Óloysiliga knýtt at spurninginum um fundament er spurningurin um trúgv. Hvørjum trúgva vit? Trúgva vit á Jesus, sum er "upphav skapnings Guds" Ella trúgva vit á ein samanvavstur av Darwin (menningarlæra) og humanismu.

Menningarlæran er í sær sjálvum kynisk. Hetta gav at bíta, tá Jarl Giske hevði fyrilestur á fróðakaparsetrinum undir heitinum: *"Evolusjon og kristen tro - en uunngåelig konflikt?"* Giske er professari í lívfrøði á Universitetinum í Bergen, har hann undirvísir í evolutiónsteori. Í fyrlestrinum vísti hann á kynismuna í menningarlæruni. Hetta fekk játtandi humanist á staðnum at siga, at viðkomandi var skelkaður.

Sum lívsgrundarlag kann menningarlæran ikki standa einsamøll. Fyri at kunna svølgja hana í gerandisdegnum má humanisman blandast uppí. Humanisman sær burtur frá Gudi og øllum hansara verkum og setur menniskjað í miðdepilin. Í stuttum kann sigast, at tað humana í humanismuni í veruleikanum ikki snýr seg um annað enn tað behagiliga. So idegrundarlagið undir fosturtøku er kynisma blanda saman við behagiligheit. EINKI skal forða MÆR.

Henda kyniska behagiligheitin vísir seg ikki bert í fosturtøku. Í londum har frí fosturtøka hevur verið galdandi í mong ár, er tankin um "mosturtøku" fyri langari tíð síðani blivin borðbærur og er í onkrum landi longu fluttur frá tanka til handling. Í Hollandi loyvir lógin aktivari deyðshjálp longu frá 12 ára aldri. Neyðugt er bert við loyvi frá einum lækna og deyðshjálpin kann fremjast beinanvegin. Er hetta rætt? Sandbyggjarin sigur ja. Klettabyggjarin sigur nei.

Koma vit nærri?

# Tubbakk og vánaligar fyrimyndir

**Victor Carlsen**

Í hesum døgum verður nógv gjørt burturúr, at Føroyar nærum hava heimsmet í at tey ungu í dag rættuliga tíðliga í tilveruni gerast roykjarar. Nakrar av grundunum, ið nevndar vera eru, at aldursmarkið fyri at kunna keypa tubbakk er ov lágt, og at prísurin ikki avmarkar tað at kunna keypa.

**Fyrimyndin**

Fari við hesum reglum at vísa á, at hetta bert ein lítil partur av tí samlaða sannleikanum. Allarstørsta ávirkanin hjá tí unga kemur úr tí dagliga umhvørvinum hann/hon hevur. Hugsi her fyrst og fremst um heimið. Roykja foreldur og onnur systkin, so er mest sannlíkt at tann ungi eisini byrjar at roykja, og enntá á sera ungum aldri, heilt niður í 12 — 13 ár. "Kunnu mamma og pápi, so kann eisini eg", hugsar hin ungi.

Sosiala umhvørvið millum vinir hevur sera stóran týdning, og her er tað bólkatrýstið, ið ger seg galdandi, at ein ikki vil vera øðrvísi enn hini. Fer tann ungi uppí skótarørsluna ella ítróttarfelag, ja, so eru fyrimyndirnar aftur har. "Kann venjarin, ella bólkaleiðarin roykja, so kann eisini eg", hugsar hin ungi. Ikki at tala um "idolið" sum tann ungi sær upp til, so er ávirkanin týðulig, um hesin roykir. Tað var eitt satt vónbrot fyri meg at síggja HB´arar koma aftur av ferð sum føroyameistarar, roykjandi og ávirkaðir av rúsdekka og nærum týggja sær sum skommir og við tí vera sera ringar fyrimyndir fyri teimum ungu. Sjálvur eri eg HB´ari og vildi fegin sæð, at broyting kemur í hesum viðvíkjandi. HB-húsið sigst vera "Roykfrítt umhvørvi", men eg havi ikki upplivað tað enn.

**Kirkjur og samkomur**

Kemur tann ungi inn í kirkju- og samkomuligt umhvørvi, so er sama søgan her, tí ikki er óvanligt at síggja persónar við ábyrgdarstarvi innan nevndu kirkjur og samkomur roykja. Tað skuldi verið sjálvsagt, at teir og tey, ið prædika frelsu frá leinkjum, ið binda okkum sum menniskju, gingu undan sum góðar fyrimyndir og ikki roykja. Tað skuldi nærum verið óneyðugt at prædikað og undirvíst um avhaldni frá rúsandi evnum innan tað kristiliga økið, men sum støðan er í dag, er hetta alneyðugt.

**Politiska umhvørvið**

Hugsa vit okkum til okkara politiska umhvørvi, so er søgan aftur hin sama. Nógvir politikarar standa alment fram við pípu og sigarett og vísa við hesum, hvat teir halda um tað at roykja. Føroya Løgting er sum heild alt ein vánalig fyrimynd. Fari ikki her at seta navn ella starvsheiti á nakran av hesum fólkavaldu. Tað síggja vit øll.

**Sjúkrahúsøkið**

Bæði læknar og sjúkraróktarstarvsfólk roykja, ja, enntá í arbeiðstíðini. Mótsigandi má tað vera, tá sjúklingur fær viðgerð fyri hjarta- og karsjúkur ella krabbamein og fær at vita, at orsøkin til sjúkuna er tubbaksroyking. Læknin sum gevur boðini og stendur fyri viðgerðini er kanska sjálvur roykjari. Hvussu skal ein blindur leiða ein blindan?

**Arbeiðspláss**

At arbeiðspláss avmarka tubbaksroyking er eisini gott og fyribyrgjandi. Her eiga stjórn og leiðsla at ganga undan sum fyrimyndir og sjálv gera eitt fyribyrgjandi arbeiði. Ikki er óvanligt at hoyra, at syrgt verður fyri heilsugóðum kosti til starvsfólkini í arbeiðstíðini. Tiltøk heilsuni at frama verða fyriskipað og trivaðurin settur í hásætið. Hetta er leiðin fram.

**Ítróttur og fyribyrging**

Frammi hevur verið, at ítróttur og rúsevni hoyra als ikki saman. Tað eru felagsskapir, ið arbeiða fyri rúsfríum umhvørvi og fyribyrgjandi tiltøkum, ið siga so, men lítið nyttar, tá leiðandi persónar innan nevndu stovnar sjálvir ganga undan sum vánligar fyrimyndir við sigarettini fremst. Kanska tað ikki verður drukkin rúsandi løgur ella notin onnur rúsandi evni, men er tað nakað rúsevni, ið ger njótaran hongdan at rúsinum, so er tað tubbakkið.

Eg gleðist um at hoyra, at okkara heilsumálaráðharri er farin í gongd við ábøtur, tá talan er tubbakk. Tiltøk, sum at beina tubbakið burtur av hillunum, hægri prísir og hækkað aldursmark er leiðin frameftir.

Eftir stendur nú bara at fáa fyrimyndirnar at gera tað sama. Við kemur fyribyrgingin upp á eitt enn hægri støði.

# Abort og Hilmar Simonsen

**Bill Justinussen**



Bert ein lítil viðmerking til títt innlegg í „Hinvegin" í Dimmu 29.10.04. Tú heldur, at um Saddam Hussein og Hitler høvdu verið aborteraðir, hevði heimurin sæð munandi betri út og kemur til ta heldur óvanligu niðurstøðu, at fosturtøka kanska er eitt gott vápn móti yvirgangi. Sera undarligur hugsunnarháttur, má sigast. Í Føroyum hava vit ikki fría fosturtøku, og tí má staðfestast sambært tínum hugburði, at her búgva rættiliga mong ólukkulig menniskju, sum hava havt ein ringan uppvøkstur og sum harvið eru møgulig yvirgangsfólk. Eg haldi ikki, at tað er støðan í Føroyum. Mær vitandi er ongin núlivandi føroyingur yvirgangsmaður, og fáir um nakar eru farnir í søguna sum yvirgangskroppar. "Hinvegin" eru helst mangir yvirgangakroppar í londum við fríari fosturtøku. Kanska er fría fosturtøkan ein orsøk?? Kanska verður eitt samfelag, sum so grundleggjandi vendir sær móti náttúrulógunum og náttúrunnar Skapara, spakuliga avskeplað og elur upp ófrættakenslur, sum síðani føra við sær enntá yvirgang?? Tá man við lóg hevur givið rætt til at avlíva lítla barnið í móðurlívi, hevur almenna virðingin fyri mannalívinum kanska fingið eitt álvarsligt skot fyri bógvin, og er vegurin tá styttri at gera seg inn á mannalívið á annan hátt. Kanska!?

# Nei, hr. býráðsformaður!

**Jákup av Skarði**
*Nólsoy*

Bretar høvdu skemtiliga sending, har heitið var nógv positivari og lýsti gleði mína í summar: Yes, Mr. Primeminister. Sendingin var skemtilig, men hálvur-annar minuttur í Útvarpi Føroya hóskvøldið 28. oktober, vóru grátiligir.

Lítla løtu tók tað loftmiðlinum at bera sorgarboðini: Komandi árini er ikki gjørligt at búgva í Nólsoy og fara til arbeiðis – um tú er so heppin at vera foreldur. Dagstovnurin, sum skuldi standa klárur á sumri 2005 verður ikki liðugur. Frá august 2005 er eingin stovunur í Nólsoy, ið hýsir vøggustovu, barnagarði ella frítíðarskúla.

Almennur fundur var í Nólsoy í summar, har borðreitt var við góðum ætlanum, um Nólsoyar kommuna legði saman við Tórshavnar kommunu. Ikki roknaði undirritaði við, at greiða svarið frá Jan Christiansen, bert var valagn. Greiði spurningurin var: "Er tað vist, at nýggjur stovnur er klárur at taka í nýtslu, tá ið leigusáttmálin við verandi stovn gongur út í august 2005." Svar býráðsformansins var eins greitt: "Ja!" Kommunuvalið nærkast og greiða støðan er nú: "Nei!"

Harvið sleppa áleið 20 fólk ikki til arbeiðis. Tí hvørki vøggustova, barnagarður ella frítíðarskúli eru tøk frá august 2005 til í fyrsta lagi á sumri 2006 – ella um illa vil til, so kunnu hesi fólk ikki fara til arbeiðis fyrr enn í september 2008!

Orsøkin er einføld. Í sáttmálanum fyri samanlegging stendur, at nýggjur stovnur skal byggjast í komandi setu og tó at býráðsformaðurin í stórkommununi sigur ja, so meinar hann nei.

Ikki ætlaði eg, at Leikalundin (vøggustovan, barnagarðurin og frítíðarskúlin) skuldi vera partur av valagninum til kommunuvalið 2004. Skilti í summar, at hetta var avgreitt mál, tí økið har stovnurin skal byggjast, skal planerast innan samanleggingina, og bygdarráðið í Nólsoy hevur langt síðani víst á tekst, ið lýsir nýggja stovnin – í orðum.

Eg vildi ynskt, at ráðandi fólki helt seg til tær avtalur gjørdar vóru, eisini munnligu.

Við ynskjum, at stórkommunan sleppur undan bíðilistanum á hesum øki.

VIÐMERKINGAR

# Óskipað vinnulív !

**Janet Fríðu Johannesen**

Útgreining av viðmerking í fimmarinum mikudagin

*Føroyska vinnulívið er skipað á nógvum økjum. Tá eg í útvarpinum mikudagin segði, at viðurskifti innan vinnulívið ikki er skipað, varð sipað til, at tað er ikki nøkur skipað upplæring av skúlaðum fólki, sum kunnu taka ábyrgd og mynda føroyska vinnulívið. Her verður hugsað bæði um kvinnur og menn. Avleiðingin er, at vinnulívið gerst einstáttað og nógv veikari enn tað vildi verið, um vinnan var før fyri at nýta potentialið, sum býr í tí einstaka.*

**Ítróttur sum fyrimynd**

Fyri 30 árum síðani vóru handbólstliðini domineraði av einum ella tveimum leikarum, ið áttu alt spæli. Hesir leikarar hildu seg framat, og dugdu at tekkjast venjaranum. Tá liðið spældi dystir, áttu hesir leikarar allan dystin, og uttan hesar leikarar var liðið einki vert. Hesir leikarar fingu loyvið til at seta seg á tey bestu plássini, og torført var hjá hinum leikarunum at fáa ment seg. Sæð í altjóða høpi vórðu hesi liðini veik og sárbar.

Innan ítróttin varð man fyri nógvum árum síðani greiður yvir, at skuldi man hava eitt sterkt hondbóltslið og fótbóltslið fyri ikki at siga eitt sterkt landslið, so mátti ein miðvís venjing til fyri at menna talentini. Tað vóru ikki bara tey, sum hildu seg framat, sum høvdu talentir. Við miðvísari venjing, fingu nærum øll talentini møguleika at spíra. Harafturat fingu tey, sum longu dugdu at halda seg framat møguleika at mennast enn meir, tá tey kundu spæla saman við góðum leikarum og ein ávís kapping varð um plássini.

**Sterkt vinnulív við hugflogi**

Vit hava nógv skúlaði fólk í Føroyum. Tað mangla arbeiðspláss serliga í vinnulívinum, har kvinnur á jøvnum føti við menn fáa møguleika at menna seg, so tey seinni kunnu gerast leiðarar. Í miðfyrisitingini eru hesi arbeiðspláss nógv vanligari, og hetta saman við setanaðarpolitikkinum ger, at fleiri kvinnur mynda almenna bygnaðin.

Skulu vit hava eitt sterkt vinnulív við hugflogi, sum kann standa seg í altjóða kappingini, mugu serliga stjórar og leiðarar læra at brúka vitanaðartilfeingi hjá bæði kvinnum og monnum. Hugburðurin, at tað bert eru tey, sum halda seg framat, ið hava vinnutalentir, má broytast.

# LOKALBÝRÁÐ?

**Hanus Vang**



Eitt tað sjónligasta slagorðið til býráðsvalið í Tórshavnar Kommunu er:

TÓRSHAVN - FYRST og FREMST!

Hvør er sanna meiningin við hesum orðum?

Man hon vera at tá Havnin hevur fingið øll síni hugsandi ynskir uppfylt, fer kanska onkur moli at falla til bygdirnar í Tórshavnar Kommunu?

Ein gomul søga er um tá stuttligir havnarmenn býttu fisk:

Tú ein lítlan — Eg ein stóran. Eg ein stóran og tú ein lítlan! Og soleiðis var alt býtið.

Útfrá mínum Hoyvíksroyndum av at koma undir Býráðið í Havn, haldi eg at áðurnevnda slagorð er tað sannasta íð sagt er av Býráðnum nakrantíð.

Hyggja vit eftir Tórshavnar Kommunu er hon 17 býir/bygdir:

Tórshavn
Kalbak
Kalbaksbotnur
Sund
Hvítanes
Hoyvík
Argir
Syðradalur
Norðadalur
Kollafjørður
Oyrareingir
Signabøur
Kirkjubøur
Velbastaður
Hestur
Koltur og
Nólsoy.

Yvirlitið er sett upp sum kommunan er vaksin.

Sjálvandi er Havnin munandi stórst av hesum plássum, men meiningin við stórkommununi kann ikki vera at tær sekstan bygdirnar einans skullu gjalda kommunuskatt til at brúka í Havn.

--------

Fleiri valevni skriva um hvussu Havnin skínur og framhaldandi skal skína. Tað er gott. Men her er mismunur galdandi.

Hesi valevni kundu fari ein túr inn á Sund, Sandvíkahjalla og í Sandvíkar at hugt eftir hvussu baksíðan "skínur".

Eisini kundu tey fari ein túr eftir gøtunum í Hoyvík og kunna seg um hvussu "væl" tær verða hildnar.

# Títt vald sum brúkari

**Petur í Gong**
*Formaður í Brúkarasamtakinum*

Hevur tað nakað at siga, hvønn politiskan lit tú hevur, tá tú verður snýttur? Ella tá tú keypir eina dálkandi ella dálkaða vøru? Tá tú stuðlar barnaarbeiði ella mannatýnan? Helst ikki.

Burmesarin, ið yvirlivdi álopi á bygdina, og nú arbeiðir sum trælur við at fella teaktrø, leggur líti í, hvønn flokk tann velur, ið hevur so ovurstóran tørv á havamøblum. Heldur ikki ger tað nakran mun hjá teimum børnum, hvørs foreldur hava selt tey til onkra verksmiðju at seyma okkum klæðir. Og ei heldur er tann skitna luftin léttari at anda um tú velur rættan flokk. Tí hesi eru øll viðurskifti, ið røkka langt út um allar politiskar flokkar, men sum tú sum brúkari hevur vald at stýra.

Á heimligum gøtum snýr tað seg mest um ítøkiliga stýring av marknaðarkreftunum. Ein spøk byrjan at fylgja somu strongu etisku, umhvørvisligu og heilsuligu krøvum, sum øll onnur framkomin lond hava sett sær sjálvum. Nevnliga fyri at tryggja framtíðina hjá børnum okkara.

Vit føroyingar hava onga skipaða almenna upplýsing av nøkrum slagi, ið kann tryggja okkum innlit í hesi mál. Hvørki um nýtslu, umhvørvið, etik ella heilsu. Av tí sama vita vit líti og einki um hesi evni, ið annars fylla so at siga alt kjakið í grannalondunum. Hetta førir so víðari við sær, at vit onga støðu hava til hesi mál. Júst sum við so nógvum, sum hendir uttan fyri landoddarnar.

Men hetta gongur ikki. Alheimsgerðin hevur gjørt okkum til partar av tí samanrunna heiminum soleiðis, at vit noyðast at taka á okkum ta ábyrgd, ið fylgir við, tá ein er borgari her á foldum.

Vit eru 48.000 brúkarar, sum hvørt ár innflyta fyri nær um kr. 5.000.000.000 í vørum og tænastum. Um vit ongantíð seta spurning við, hvørjar hesar vørur eru, venda vit samstundis blinda eygað til ein stóran part av heimsins neyð og dálking. Tí krevur samtíðin av okkum, at vit seta okkum inn í, hvussu vøran er framleidd, og at vit taka støðu til, um vit góðtaka framleiðsluháttin ella ei. Hetta hevði tó verið ólíka léttari, um vit við brúkaraverndarlógum longu høvdu solda tað ringasta frá.

Men tað er títt val sum brúkari, ið hevur alt at siga.

# Býarbókasavnið í Havn á 2. hædd – uttan lyftu

**Miriam Hinz**

Fór mær nú ein dagin so hugagóð oman á Býarbókasavnið í Havn at læna mær nakrar bøkur. Men av tí, at eg hevði barnavogn við mær, mátti eg sanna, at tað als ikki er so einfalt at vitja bókasavnið við barnavogni. Um eg hevði verið ómetaliga vøddamikil - t.d. verið lík einari amazonu (sterkar suður-amerikanskar kvinnur - hevði eg kanska klárað at lyft barnavognin upp á 2. hædd. Men eg eri bara ein heilt vanlig mamma, so har var eingin møguleiki at koma upp á bókasavnið, um eg ikki tók lítla upp úr vogninum. Tað hevði eg tó ikki so góðan hug til, tí hann var júst sovnaður. Tískil blivu ongar bøkur læntar tann dagin. Men nú býráðsval í honum, fari eg at nýta høvið til at heita á valevnini um eisini at lova (og geva) veljarunum eina lyftu til Býarbókasavnið. Hetta hevði bøtt munandi um møguleikarnar hjá barnafamiljum - og hjá rørslutarnaðum - at brúkt bókasavnið.

# Einki alternativ til verandi samgongu

**Leygardagin 30. oktober hevði Sambandsflokkurin árliga heystfundin á Hotel Hafnia í Havn. Á fundinum varð litið aftur at farna árið, og gjørt var upp, hvat er fingið av skafti, nú fyrsta arbeiðsárið hjá sitandi samgongu skjótt er farið afturum**

HEYSTFUNDUR

*Tíðindaskriv frá Sambandsflokkinum*

Á fundinum varð ásannað, at einki alternativ er í løtuni á Føroya Løgtingi til verandi samgongu, tí meðan samgongusamstarvi gongur væl, so liggur andstøðan í innanhýsis stríði, og er tí ikki før fyri at taka yvir í landsins leiðslu.

Samgongan hevur sett sær nógv góð mál fyri, men ásannað verður, at fleiri av hesum ætlanum eru bráðneyðugar, og at tær tí mugu setast í verk skjótast til ber. Sum búskaparliga støðan í landinum er vorðin, er neyðugt, at tey tiltøk sum kunnu skapa búskaparvøkstur, verða sett í verk alt fyri eitt.

Sambandsflokkurin hevur fyrr, við góðum úrslitum, tikið við landsins leiðslu í bæði ringum og versnandi tíðum, og tað hevur hann aftur gjørt hesaferð. Flokkurin fer at virka fyri, at vælferðin verður ment, at vinnulívið verður styrkt og at Føroya fólk fær fjøltáttaðar møguleikar í altjóða høpi.

Í samgonguskjalinum verður víst á, at inntøkur skulu finnast við at privatisera almennar fyritøkur og ígjøgnum vinnupolitisk tiltøk. Tað má tí vera eitt krav til samgonguna, at nakað veruligt hendir á hesum økjum beinanvegin.

Nógv fyrireikingar-arbeiði er longu gjørt, og tíðin má vera komin, hvar ið næsta stigið verður tikið.

Sambandsflokkurin trívist væl í samgongu, og flokkurin leggur stóran dent á framhaldandi at vera ein álítandi samstarvsflokkur, soleiðis at aðrir flokkar, bæði í samgongu og andstøðu, kunnu líta á, at Sambandsflokkurin heldur allar gjørdar avtalur.

Nógv fólk vóru komin saman á heystfundi Sambandsfloksins og hýrurin á fundinum var góður.